Lagt til rættis:
Eydna Skaale
eydna@sosialurin.fo

# Plateau-skógvar



Tú mást hava einar plateau skógvar ella sandalir í summar. Tað er greiði boðskapurin, sum øll mótahúsini úti í heimi tykjast vera samd um. Á øllum mótapallum kring heimin -alt frá Stella McCartney til Gucci til Burberry- síggjast eyðkendu høgu pleatau skógvarnir.

Eisini Christian Louboutin og Manolo Blahnik hava hópin av júst hesum slagnum av skóm í sínum skógvakollektiónum fyri vár og summar.

Sniðini eru sera ymisk –alt frá leðri við nittum, hvítum satini við korkbotni og kitch'utum ælabogalitum. Tað týdningarmesta er, at botnurin í minsta lagið er hálvanannan centimetur høgur og at skógvarnir eru høghælaðir. Óansæð hvønn stíl tú hevur, so finnur tú uttan iva júst røttu plateau skógvarnar til tín í vár.

Skógvarnir síggja út til at vera hægri -og verri at ganga í- enn teir faktiskt eru. Tí hóast teir eru sera høgir, so er eitt "plattur" lagdur undir tærnar, sum neutraliserar eitt gott petti av hælinum.

Hetta ger, at teir als ikki eru so torførir at ganga í hóast alt.

Og um tú ert í iva um nýggja høghælaða plateau-mótan, minst so til, at høgir hælir geva ein flottan og kvinnuligan holdning, teir geva leggjum og lørum ein flottari form, umframt at teir lyfta rumpuna. So ger sum førandi mótaskapararnir úti í heimi – og gev plateauskónum heiðurspláss í vár og í summar.



Christian Louboutin – Svartur skógvur við similisteinum



Christian Louboutin – Brún sandal við leðurreimum



Gucci – Lakk sandal við hvítum botni og opnari tá



Gucci – Svartur leðurskógvur við gullpynti



*Gucci – Hvít sandal við korkbotni*



Manolo Blahnik – Brúnur leðurskógvur við opnum hæli



Manolo Blahnik – Svartur leðurskógvur við pink seymi



Christian Louboutin – Svartur økla-skógvur við nittum




**1.** Hvítur leður skógvur frá Chloé við opnari tá. **2.** Chanel "take me higher" sandal. **3.** Giambattista Valli hvítur og pink leður sandal, við sera høgum botni. Sí mynd av Mary Kate Olsen, filmsstjørnu og trendsetara. **4.** Versace satin sandal við pynti eftir ristini. **5.** Dereak Lam sandal við kílahæli. **6.** Christian Louboutin kork slingback. **7.** Skógvur frá Alexander McQueen úr svørtum leðri og gulli. **8.** Christian Lacroix sandal við stróum simili steinum. **9.** Fendi sandal úr ruskinni og plexiglasi. **10.** Hvít Givenchy sandal við reim um økulin, sí mynd av Carine Roitfeld, modell.

Kelda: runwaytoday



Burberry – Sandlir við nittum



Burberry - hvítur við opnari tá



Christian Louboutin – Pink skógvur við glimmur